ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

9. desember 2019
Mál: 19/00965-2
Tygara Skriv:
Viðgjørt: Elin Winther Poulsen

Nr. 24/2019

Svar

upp á

fyrispurning nr. 24/2019 frá Ingilín Didriksen Strøm, løgtingsmanni. Fyrispurningur um sálarligan harðskap, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er ætlanin at seta lóg í verk, sum javnsetur kropsligan- og sálarligan harðskap?

2. Verður farið undir at seta á stovn eina móttøku til tey, ið eru fyri harðskapi, har øll neyðug hjálp og ráðgeving er savnað?

Svar

Til nr. 1. Í roynd og veru snýr hesin spurningurin seg um, um vit skulu gera broytingar í revsilógini. Revsilógin er málsøki hjá løgmanni og eg fari tí at heita á spyrjaran um at seta løgmanni fyrispurningin.

Til nr. 2. Tíverri er framvegis neyðugt støðugt at arbeiða við at basa harðskapi og ágangi, og tí verður eisini áhaldandi arbeitt við at bøta um umstøðurnar hjá teimum, sum eru fyri harðskapi.

Samgongan hevur sett sær fyri at fáa Kvinnuhúsinum størri játtan til vega á fíggjarlógini fyri komandi ár. Arbeitt verður eisini við at fáa fígging, soleiðis at farast kann undir at fáa til vega hagtøl, sum kunnu lýsa hetta økið í síni heild, so vit betri eru før fyri at meta um, hvat er týdningarmikið, og hvussu er skilagott at halda fram.

At seta á stovn eina móttøku til tey, ið eru fyri harðskapi, har øll neyðug hjálp og ráðgeving er savnað, verður umrøtt í Almannamálaráðnum, og eg haldi hetta vera eina áhugaverda skipan. Farið verður tó ikki alt fyri eitt undir at lata upp eina slíka móttøku í Føroyum.

Samstarv og samskipan eru alneyðug, tá talan er um at veita hjálp og stuðul til teirra, sum eru ella hava verið fyri harðskapi. Júst tí fegnast eg um tað góða samstarv, sum er á hesum øki.

Síðani 2012 hevur verið arbeitt við at seta í verk átøkini í Heildarætlan um harðskap í parløgum og nærsambondum eins og Heildarætlan um kynsligan ágang.

Í hesum arbeiði hevur alla tíðina stórur dentur verið lagdur á eitt gott og skipað samstarv millum stovnar, myndugleikar og viðkomandi aktørar, og samstarvið á økinum riggar serstakliga væl.

Í sambandi við arbeiðið at basa harðskapi og ágangi, sum verður gjørt undir heitinum Sig frá, hevur Almannamálaráðið stak gott samstarv við nógvar stovnar og aktørar. Nevnast kunnu úr rúgvuni Politiið, Kvinnuhúsið, Fólkaheilsuráðið, Amnesty International, Apoteksverkið, Gigni, v.fl.

Tað er ein sannroynd, at samstarv fremur frægastu úrslit. Ikki minst her hjá okkum er neyðugt at arbeiða saman móti týdningarmiklum málum. Millum annað tí at vit ikki eru so fjølment, og tí ikki hava møguleika at skipa stovnar og tilboð á júst sama hátt, sum tey gera í øðrum, størri londum.

Hetta nýtist á ongan hátt at merkja, at tilboðini eru verri enn aðrastaðni. Nevnast kann, at tá vit taka lut í norðurlendskum samstarvi, verður ofta lagt til merkis, hvussu vit skipa okkum á hesum øki.

Peningur er ikki settur av í fíggjarlógaruppskotinum til eina móttøku, ið savnar allar viðkomandi tænastur á einum stað til tey, ið eru fyri harðskapi, men kannað verður alla tíðina, hvar og hvussu vit eiga at leggja orkuna til tess at basa harðskapi.

Tórshavn, 9. desember 2019

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýriskvinna